

# Føroyar mítt land

Aftur hesa vikuna vóru fimm áhugaverd evni umrødd í sendirøðini "Føroyar mítt land", sum er á Rás2 hvønn gerandisdag. Evnini, sum vórðu umrødd í sendirøðini í hesi vikuni, og sum høvi verður at endurhoyra sunnudagin klokkan 13, vóru: ein summardagur á Skarði; útróðrarsiðir og –traditiónir; føroyski tjóðbúnin, hesa ferð um hosubond, tólvtáttaband og hosur; vit hoyrdu um plantuvøkstur á Hellunum og mentakvinnuna Súsonnu Helenu Patursson, sum livdi frá 1864 til 1916. Tey, sum løgdu til rættis hesa vikuna, vóru: Halgir Winther Poulsen, Janus Mohr, Nicolina Jensen Beder, Helena Samuelsen og Turið Sigurðardóttir.

Rás2, sunnudagin klokkan 13.

**Føroyar mítt land í næstu viku:**

23/6 Andreas Andreasen
24/6 Janus Mohr
25/6 Nicolina Jensen Beder
26/6 Eirikur Lindenskov
27/6 Eli Poulsen

Hvønn gerandisdag kl. 8, kl. 9, kl. 22 og kl. 23, (týsdag tó 22.30)

# Ungir grønlendingar feitast í heiminum

Heimsheilsustovnurin WHO hevur gjørt eina kanning av heilsustøðuna hjá ungfólki kring heimin. Umstøðurnar í 40 londum eru kannaðar, og ein av niðurstøðunum er, at ungfólk í Grønlandi eru tey feitastu í heiminum. Royking og vánaligir matvanar gera, at so nógv ung millum 13 og 15 ár í Grønlandi viga ov nógv. Tey ungu eta eisini ov lítið av frukt, og ferðasambandið er so vánaligt nógva staðni, at fólk liva av frystum matvørum og fáa ikki frukt og grønmeti í nóg stóran mun. Heilsukanningin hjá WHO vísir hinvegin, at grønlendsk børn eru sera virkin – tey røra seg nógv og eru væl nøgd við skúlan.



Sosialurin